# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 25.08.2025 kl. 17.00

Á fundi: Poul Laust Christiansen
Rakul Mørk
Jóhannes Liasson Rasmussen
Jónfinn L. Poulsen
Thorstein Thomsen (fyri Otto West)

Ikki møtt: Janus Thomsen
Otto West
Ronni Hammer

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – játtað og kemur á skrá sum mál nr. 5.

1. **102-43-2025: Umsókn um fíggjarligan stuðul 2026 frá bóltfelagnum ROYN.**

   Samtykt varð at útseta málið til komandi fund.

2. **102-44-2025: Umsókn um stuðul til tiltak í Hvalba 30.08.2025 «Sjórænaradagur».**

   Aftur í ár ætlar áhugabólkur at skipa fyri sjórænaradegi í Hvalba. Hesaferð verður søkt um vanliga stuðulin kr. 5.000,00 + eyka stuðul til leigu av sluppini Johannu kr. 10.000,00.

   **Trivnaðarnevndin 25.08.2025:**

   Nevndin mælir til at stuðla við kr. 5.000,00 til mat o.a. + kr. 10.000,00 fyri leigu av sluppini Johannu.

   **Fíggjarnevndin 25.08.2025:**

   Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla tiltakinum við kr. 10.000,00, tó við kr. 15.000,00 íalt, um skip/slupp verður leigað.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð einmælt at stuðla tiltakinum við kr. 18.000,00 íalt, um skip/slupp verður leigað.

3. **102-46-2025: Fyrispurningur um loyvi til uppsetan av antennu.**

   Søkt verður um loyvi at seta eina basu antennu upp á Roynhøllini, matr. nr. 208, Hvalba. Endamálið við hesum er at betra um GPS-sambandið.

   **Tekniska nevnd 25.08.2025:**

   Nevndin mælir til at geva loyvi til hetta.

   **Avgerð:**

   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini og geva loyvi.

4. **<u>102-47-2025: Skriv frá Hvalbiar skúla</u>.**
Søkt verður um loyvi at keypa 3 stk. 2 mans-sofamodulir, serliga ætlað næmingum, ið hava trupult við at hugsavna seg.
<u>Tilboð frá Inventar-tænastuni</u>:

| | |
|---|---|
| 2-mans Meeting Point | kr. 29.900,00 u/MVG |
| 3-mans Meeting Point | kr. 34.200,00 u/MVG |
| MR. Box roof 2 mans | kr. 13.200,00 u/MVG |
| MR. Box borð til t.d. 2 x sofur | kr. 2.300,00 u/MVG |
| Samlaður kostnaður fyri 3 stk. 2 mans-sofamodulir + borð | kr. 96.760,00 u/MVG |

**Trivnaðarnevndin 25.08.2025:**
Nevndin mælir til at játta skúlanum at keypa 3 stk. 2 mans-sofamodulir + borð.
**Fíggjarnevndin 25.08.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at játta keyp av 3 stk. 2 mans-sofamodulir + borð, kostnaður íalt kr. 96.760,00 u/MVG.
**<u>Avgerð</u>:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

5. **<u>102-48-2025: Gamli skúli</u>.**
Oljufýrið í gamla skúla er gingið fyri, so bygningurin stendur kaldur í løtuni. Umsókn frá Hvalbiar Kommunu um loyvi at bora hol til møguligan jarðhita við gamla skúla, matr. nr. 79a.
**Tekniska nevnd 25.08.2025:**
Nevndin mælir til at góðkenna umsóknina, treytað av loyvi frá Umhvørvisstovuni.
**Fíggjarnevndin 25.08.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at fara í holt við at bora jarðhitahol við gamla skúla.
**<u>Avgerð</u>:**
Einmælt samtykt at beina málið aftur í Teknisku nevnd.

6. **<u>Ikki alment mál</u>.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.00

Poul Laust Christiansen Rakul Mørk Jónfinn L. Poulsen

Jóhannes Liasson Rasmussen Thorstein Thomsen